Jenis av Rana:

# Jørgen eigur at fara frá

**Jenis av Rana fer at heita á Jørgen Niclasen um at fara frá, tí hetta vil gagna øllum best. Hann heldur, at tað er upp til samgonguna at taka eina politiska avgerð í málinum og ikki andstøðuna**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

— Eg síggi avgerðina hjá løgmanni sum eina juridiska avgerð. Tað er uppgávan hjá løgmanni at hava eftirlit við landsstýrismonnunum. Hann hevur givið Jørgen Niclasen fleiri átalur, men ikki valt at koyra hann frá, og hetta er ein rættur, hann hevur. Talan er ikki um nakra politiska avgerð, sigur Jenis av Rana, ting- og formaður fyri Miðflokkin.

Avgerðin um átalur hjá løgmanni var ein juridisk avgerð, og tann politiska avgerðin skal – sambært Jenis av Rana – takast av samgonguni.

— Tað er samgongan, sum hevur átikið sær at stýra landinum, og eg vænti, at ein politisk avgerð verður tikin í samgonguni, har løgmaður eisini verður við, sigur Jenis av Rana.

Støðan hjá Jenis er ógvuliga greið um framtíðina hjá Jørgen Niclasen.

— Eg fari at heita á Jørgen Niclasen um at fara úr starvinum sum landsstýrismaður. Hetta vildi verið tað besta fyri samgonguna og fyri Jørgen sjálvan. Tað skaðar umdømi hjá samgonguni, at hann verður sitandi í landsstýrinum, sigur Jenis av Rana.

Formaðurin í Miðflokkinum heldur tað vera púrasta burturvið at tosa um misálit á løgmann.

Hann hevur ikki tikið støðu til, um hann fer at atkvøða fyri einum misáliti í Løgtinginum, verður hansara áheitan ikki gingin á møti.

– Eg fari fyrst at heita á hann um at leggja frá sær, og so fáa vit at síggja, hvat víðari hendir, sigur Jenis av Rana.



*Jenis av heldur, at tað nú er upp til samgonguna at gera av, hvørjar politiskar avleiðingar hetta skal fáa fyri Jørgen Niclasen. Sjálvur heldur hann, at landsstýrismaðurin eigur at fara úr starvinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Ikki undirgrava

Fyri Jenis av Rana hevur tað alt at siga, at arbeiðið hjá kanningarstjóranum ikki verður sæð burtur frá.

— Vit mugu ikki undirgrava arbeiðið hjá kanningarstjóranum. Um mann ikki virðir kanningarnar hjá einum tílíkum og ásetur fylgjur eftir niðurstøðum hjá honum, so kunnu vit tað sama avskaffa at hava kanningarstjórar, metir Jenis av Rana.

Stórur vandi er fyri, at avgerðirnar hjá Løgtingsins umboðsmanni heldur ikki verða fylgdar, um kanningarstjórar ikki verða virdir, metir Jenis av Rana.

— Hetta hendir ikki uttanlands, sigur Jenis av Rana.

# Føroyar limir í IMO

**Atlimaskapurin í IMO má metast at vera størsta stovnsliga frambrot á sjálvstýrisleið í føroyskum uttanríkispolitikki síðani 1948, verður**

LIMASKAPUR
*Heri á Rógvi*

Frá 5. desember 2002 eru Føroyar at rokna sum atlimur í IMO – International Maritime Organization.

Atlimaskapur merkir, at vit kunnu luttaka á fundum og hava somu rættindi og skyldur, men hava ikki atkvøðurætt og kunnu ikki sita í ráðnum fyri IMO.

— Við atlimaskapi ber til at møta á fundum, taka orðið og luttaka í øllum samráðingum í IMO. Tó hava einans fullgildugir limir, t.e. sjálvstøðug lond, atkvøðurætt. Hinvegin verður hildið, at tað hevur minni týdning, av tí at atkvøðugreiðsla ógvuliga sjáldan kemur fyri í IMO. Føroyski atlimaskapurin í IMO er søguligur á tann hátt, at hetta er fyrstu ferð, Føroyar hava fingið atlimaskap í felagsskapi undir ST, og hetta er einasti millumtjóðafelagsskapur, umframt NAMMCO, har ið Føroyar eru umboðaðar undir egnum navni. Við øðrum orðum, atlimaskapurin í IMO má metast at vera størsta stovnsliga frambrot á sjálvstýrisleið í føroyskum uttanríkispolitikki síðani 1948, stendur at lesa í tíðindaskrivi.

Orsakað av reglunum hjá IMO eru Føroyar formelt vorðnir limir hin 5. desember, men bíðast skuldi við at almannakunngera hesa hending.

IMO er stovnur undir ST. Føroyar eru ikki limir í ST, men tað er Danmark, og tað er umvegis Danmark, at Føroyar nú er vorðið limur.

Stovnurin fær í lag og umsitur altjóða sáttmálar viðvíkjandi trygd og umhvørvi á sjónum.

Málsøkið trygd á sjónum varð yvirtikið 1. januar 2002, og føroysk umboð hava verið á fundum hjá IMO áður.

IMO hevur sæti í London.

— Tað hevur stóran týdning fyri Føroyar at hava atlimaskap í IMO, serstakliga eftir, at málsøkið trygd á sjónum er yvirtikið sum føroyskt sermál og landið hevur stovnað skipaeftirlit. Eisini verða havumhvørvismál yvirtikin í næstu framtíð. Nýstovnaða Sendistovan í London fær dagligu ábyrgdina av atlimaskapinum, og nýstovnaða Skipaeftirlitið fer at fáa nýggjar og spennandi altjóðauppgávur. Nú kunnu føroyingar vera við til at ávirka avgerðir, ið leggja altjóðabond á Føroyar longu frá byrjan, og fáa skjótari og betur kunning um tað nýggjasta á økinum. Fyri eitt land við so nógvum virksemi knýttum at havinum er IMO ein sera viðkomandi og týdningarmikil felagsskapur, skrivar Løgmansskrivstovuna í tíðindaskrivi.

# Avgerðin útsett

**Tjóðveldistingmenn vilja fyrst viðgera málið innanhýsis, áðrenn støða verður tikin til, hvat skal atkvøðast í einum møguligum misáliti**

POLITIKKUR
*Heri á Rógvi*

Vit hava ringt eitt sindur runt til tingmenn hjá Tjóðveldisflokkinum fyri at vita, hvat teir halda um avgerðina hjá løgmanninum í málinum um Jørgen Niclasen, og um tey ynskja at atkvøða fyri einum møguligum misáliti.

Hóast nógvar royndir, so eydnaðist tað okkum ikki at fáa hendur á Tórbjørn Jacobsen og Annitu á Fríðriksmørk, sum bæði hava hava lagt hart út eftir Jørgen Niclasen í hesum málinum.

Heldur ikki Niklái Petersen og Rúni Hentze vóru at hitta.

Heini O. Heinesen, formaður fyri tingbólkin hjá Tjóðveldisflokkin, vil ikki siga, hvørt hann er sinnaður til at atkvøða fyri einum misáliti.

— Sum formaður fyri tingbólkin fari eg ikki at taka eina støðu fyri tingmenninar, sigur Heini O. Heinesen.

Hann er av teirri fatan, at hetta málið ikki er nakað serliga stórt, og hann heldur, at tað hevur verið onnur, sum eru størri enn hetta, har Jørgen Niclasen hevur verið upp í, ið eru farin aftur við borðini.

Eitt misálit, sum fellir Jørgen Niclasen, kann eisini fáa fylgjur fyri samgonguna, heldur Heini O. Heinesen.

— Tað er næstan at siga samgonguna upp at, metir Heini.

Tingmenninir hjá Tjóðveldisflokkinum fara at viðgera málið í næstum.

### Eigur at fáa avleiðingar

Kristina Háfoss, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, sigur, at hon nú bíðar eftir, at flokkurin fer at viðgera málið, áðrenn hon tekur nakra víðari støðu í málinum.

— Málið eigur at fáa eina viðgerð í Løgtinginum, tá tað er Løgtingið, sum hevur biðið um kanningina. Vit mugu taka tað, ein kanningarstjóri sigur, til eftirtikar. Tað burdi so fingið avleiðingar av onkra slag, sigur Kristina Háfoss.

Hon vil tó ikki siga meira um, hvørjar avleiðingarnar skuldu verið.

Hvørki Kristina Háfoss ella Heini O. Heinesen er sinnaði at gera viðmerkingar til, hvørt avgerðin hjá løgmanni var røtt ella ei.

### Bíða

Hergeir Nielsen, tingmaður fyri Tjóðveldisflokkin, sigur seg vera púra ósamdan við støðuni, ið løgmaður hevur í málinum viðvíkjandi Jørgen Niclasen og nógv umrøddi kanningini.

Hann sigur tó, at hann hevði ikki væntað annað. Hansara støða viðvíkjandi einum møguligum misáliti vil ikki siga nakað um fyrr enn tinbólkurin hevur viðgjørt málið.

Tingmaðurin Jógvan Arge hevur als onga aðra viðmerking enn, at tey fara at viðgera málið í tingbólkinum.



# Løgmaður gevur Jørgini ábreiðslu

**»Hetta verður átalað«. Soleiðis feldi løgmaður politiska dómin í málinum um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen. Landsstýrismaðurin verður sitandi, men hann verður hartaður fyri handfaringa av málinum um umlegging av skuld hjá fjarfiskiflotanum**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*



*Inn ella út. Jørgin Niclasen verður sitandi í landsstýrinum hjá Anfinni Kallsberg løgmanni*

*Mynd: Jens K. Vang*

Løgmaður fríkendi Jørgin Niclasen við støði í frágreiðingini frá landsstýrismanninum sjálvum og hansara egna stýri. Men hann gav honum samstundis eina ábreiðslu, grundað á frágreiðingina frá kanningarstjóranum, Turið Debes Hentze advokati.

Soleiðis kann støðan gerast upp, nú Anfinn Kallsberg løgmaður seinnapartin hósdagin gjørdi úrskurð í málinum um embætisførsluna hjá Jørgin Niclasen.

Í einum brævi til Jørgin Niclasen landsstýrismann, sum er dagfest 9. januar 2003, sigur løgmaður sína niðurstøðu vera, at tað ikki er grundarlag fyri at halda, at landsstýrismaðurin hevur framt brot á lógina um ábyrgd landsstýrismanna, og »at tað út frá nevnda tilfari má metast at vera sera ivasamt, um tygum hava brotið ásetingarnar í løgtingslóg nr. 26 frá 14. mars 1997 um umlegging av lánum v.m. hjá fjarfiskiflotanum«.

Tilfarið, sum løgmaður vísir til, er frágreiðing frá kanningarstjóranum, skriv frá Fiskimálaráðnum, skriv frá trímannanevndini til Fiskimálaráðið og skriv frá Jørgin Niclasen landsstýrismanni til Anfinn Kallsberg løgmann.

### Harða ábreiðslu

Sostatt taldi frágreiðingin frá landsstýrismanninum sjálvum og hansara umsiting meira enn kanningin hjá óvilduga kanningarstjóranum, ið løgtingið hevur sett. Tí kanningarstjórin staðfesti, at landsstýrismaðurin fór út um sínar heimildir í málinum.

Men hóast Jørgin verður fríkendur fyri at hava forbrotið seg ímóti lógunum, so fær hann ábreiðslu frá løgmanni fyri handfaringina hjá Fiskimálaráðnum av hesum og øðrum málum.

Løgmaður førir fram, at »málsviðgerðin í sambandi við umsóknir frá feløgunum aftan fyri skipini Høgafoss og Arctic Viking átti at verið betri løgd til rættis, og at umsiting tygara átti at biðið um eitt endaligt skivligt tilmæli frá trímannanevndini, áðrenn endalig avgerð um at víkja fyri nýggjum lánum varð tikin«.

Løgmaður hartar eisini landsstýrismannin fyri, at »tað í skjalatilfarinum ikki eru nóg góð skrivlig skjalprógv fyri grundarlagnum fyri teimum avgerðum, sum tygum hava tikið«.

### Upprudding á veg

Fyrisitingarliga viðgerðin av málinum hevur sostatt ikki verið nøktandi, ásannar løgmaður, og tað átalar hann. Anfinn Kallsberg ásannar í somu vending, at Fiskimálaráðið hevur verið fyri atfinningum í longri tíð.

Løgmaður heitir tí í brævinum á Jørgin Niclasen um at fara undir miðvísa tilgongd fyri at menna Fiskimálaráðið, so tað fer at virka betur. Ein ítøkilig ætlan fyri hetta skal handast løgmanni í seinasta lagi 1. apríl 2003.

# Andstøðan stillar kanónina

**Jørgin ella Anfinn. Tað er spurningurin, sum andstøðan viðger í løtuni. Tí tað er púra vist, at eitt misálit verður reist í løgtinginum, har samgongan kemur at standa sína roynd, antin tað so verður løgmaður ella landsstýrismaðurin, sum stendur fyri skotum**

POLITIKKUR
*Ingi Rasmussen*

Andstøðan á løgtingi reisir misálit móti landsstýrinum. Tað er greitt. Men hon ivast í, hvønn veg kanónirnar skulu venda. Móti Jørgin Niclasen, landsstýrismanni, ella ímóti Anfinn Kallsberg, løgmanni.

Formenninir í Javnaðarflokkinum og Sambandsflokkinum hava tosað saman fleiri ferðir síðstu dagarnar, har teir hava umrøtt møguleikan fyri, hvat skuldi henda, tá Anfinn Kallsberg løgmaður fór at fríkenna Jørgin Niclasen. Men enn eru flokkarnir ikki komnir ásamt um, hvør eigur at verður settur til atkvøðugreiðslu, tá løgtingið kemur saman aftur.

### Løgmaður ábyrgd

Ein einstakur løgtingsmaður kann seta fram misálit móti antin løgmanni ella landsstýrismanni. Men skal viðkomandi frá, skulu minst 17 av 32 tingmonnum atkvøða fyri. Samgongan telur 17 og andstøðan 15 tingmenn, og tí er avgerandi, hvønn taktikk andstøðan velur, um ætlanin skal eydnast.

Javnaðarflokkurin hellir til eitt misálit á landsstýrismannin sjálvan, meðan Sambandsflokkurin heldur sær løgmann settan undir atkvøðugreiðslu.

– Vit hava viðgjørt málið í Sambandsflokkinum, og vit eru ikki í iva um, at eitt misálit eigur at vera vent ímóti løgmanni. Tað er hann, sum setir landsstýrismenn í starv, og tað er hann, sum hevur høvuðsábyrgdina fyri, at hansara landsstýrismenn røkja sítt embæti á fullgóðan hátt, sigur Lisbeth L. Petersen, forkvinna í Sambandsflokkinum.

Hinvegin viðgongur hon, at tað hevði verið stak óheppið, um kanónirnar hjá andstøðuni peikaðu hvør sín veg, og tí mugu partarnir finna eitt felags stev.

### Jóannes telur

Formaðurin í Javnaðarflokkinum sigur seg væl skilja sjónarmiðið hjá Sambandsflokkinum, men hann ivast í úrslitinum, um løgmaður stendur fyri skotum.

– Eg telji eitt sindur upp á knøttarnar, tá tað skal gerast av, hvønn veg misálitið skal venda. Tað er sjálvandi løgmaður, sum er settur beinleiðis av løgtinginum, men eg eri komin til, at tað er klókari av okkum at reisa misálit beinleiðis ímóti Jørgin Niclasen, tí annars frítaka vit ávísum pørtum av samgonguni at taka støðu í ítøkiliga málinum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Tað er ikki løgmaður, sum sambært kanningarstjóranum hevur brotið lógina, og tí er tað lættari hjá Miðflokkinum, Sjálvstýrisflokkinum og Tjóðveldisflokkinum at verja seg ímóti at atkvøða fyri einum misáliti.

– Reisa vit misálit ímóti Jørgin Niclasen, so halda vit okkum til sjálvt málið. Ein kanning, sum løgtingið hevur sett í verk, staðfestir, at landsstýrismaðurin hevur brotið lógina, og tað kann gerast torført hjá eitt nú Jenis av Rana og Torbjørn Jacobsen, sum upprunaliga reisti málið í løgtinginum, at verja tað, sigur Jóannes Eidesgaard.

### Jura og politikkur

Fyri Jóannes Eidesgaard snýr málið seg mest um løgfrøði. Kanningin staðfestir, at málsviðgerðin ikki hevur verið í samsvari við lógina, og tí sóknast hann eftir, at løgtingið og serliga Tjóðveldisflokkurin, hvørs formaður er løgmálaráðharri, tekur støðu til tað.

– Um eitt misálit fellur, og hetta málið sleppur at standa ósvarað, so hevur føroyska rættarsamfelagið fingið eitt álvarsligt skot fyri bógvin. So er tað ikki rættvísi, sum telur, men viljin at halda fast við valdið, sum gerst altavgerandi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Lisbeth L. Petersen heldur hinvegin, at málið fyrst og fremst er politiskt.

– Høvuðsspurningurin fyri okkum er, at álitið á politisku skipanina millum fólk er fokið, og tað er ótrúliga týdningarmikið fyri okkum at halda fast við tað. Vit hava ikki viðgjørt kanningina, tí tað er trupult at taka støðu til ymiskar løgfrøðiligar tulkingar. Vit kunnu bara staðfesta, at alt ikki er farið rætt fram, og tí má onkur lúta, so álitið verður rættað uppaftur, sigur Lisbeth L. Petersen.

Løgtingið kemur saman aftur týsdagin, og tað er ikki óhugsandi, at eitt misálit verður reist longu tá, skilst á andstøðuni.